UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

Svar

uppá

§ 52 a fyrispurning frá Ingilín D. Strøm, løgtingskvinnu, viðvíkjandi fýrverki, nr. 067.20

Spurningurin var soljóðandi:

Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at endurskoða lóg og kunngerð um fýrverk frá 1969 m.a. við atliti at kemikalium, dálking og ljóðdálking?

Svar:

Reglurnar um fýrverk eru ikki broyttar seinastu 52 árini, og tí er sjálvsagt nógv, ið er ótíðarhóskandi, og lógarverkið treingir til eina endurskoðan.

Trygdar- og umhvørvisatlit viðvíkjandi vanligum fýrverki
Kunngerðini um fýrverk frá 1969 ásetur m.a. krøvini til merking og dygd av fýrverki. Ítøkiliga inniheldur kunngerðin krøv um merking av fýrverki, ið als ikki eru í samsvari við líknandi krøv í grannalondum okkara. Hetta merkir, at ásettu krøvini til m.a. innihaldið av kemiskum evnum í fýrverki ikki eru tíðarhóskandi, tá hugsað verður um atlit til trygd og umhvørvi. Hetta talar í sær sjálvum fyri, at kunngerðin eigur at verða endurskoðað og dagførd.

Ætlanin hesum viðvíkjandi er, at føroyska lóggávan verður dagførd soleiðis, at hon innihaldsliga samsvarar við lóggávuna í hinum norðurlendsku londunum. Tá hugsað verður um, at meginparturin av fýrverkinum verður innfluttur úr Danmark, er mest skilvíst at lóggávan í Føroyum verður gjørd eftir donskum leisti.

Viðmerkjast skal tó, at hóast lóggávan er frá 1969, er meginparturin av fýrverkinum, sum verður nýtt í Føroyum, framleitt samsvarandi lóggávuni, sum er galdandi í hinum norðurlendsku londunum, serliga teirri donsku.

Nýtsla av fýrverki
Føroyska lóggávan um fýrverk hevur sum nú er ongar ásetingar um at avmarka tíðarskeiðið, har loyvt er at selja ella at nýta fýrverk. Lóggávan ásetir tó, at søla og m.a. nýtsla einans má fara fram við loyvi frá Føroya Landfúta. Hetta merkir, at søla og nýtsla av fýrverki kann fara fram alt árið, um Føroya Landfúti tekur avgerð um at loyva hesum.

Siðvenjan í Føroyum er, at søluloyvi til fýrverk einans verður givið í tíðarskeiðinum frá 27. – 31. desember. Tað er ikki møguligt at vísa á, hvussu nógv fýrverk verður nýtt áðrenn ella

aftaná 31. desember, men ein varin meting er tó, at nógv tann størsti parturin av fýrverki verður nýttur til nýggjárshaldið 31. desember.

Tað er tí sannlíkt, at hóast føroyska lóggávan er linari, er veruliga nýtslan av fýrverki lík teirri í hinum norðurlendsku londunum. Tá lóggávan verður endurskoðað, verður eisini hugt eftir tíðarskeiðinum, loyvt er at nýta fýrverk. Her eigur eisini at havast í huga, at veðrið nýggjársaftan kann vera svikaligt, og av tí at tað ikki er ráðiligt at goyma fýrverk í langa tíð, eigur at vera loyvt at skjóta nakrar dagar inn í nýggja árið.

Neyðrakettir/neyðsignal
Leggjast skal afturat, at ein av mest álvarsomu vandunum á nýggjárinum er nýtslan av neyðrakettum, sum verður nýtt sum nýggjársfýrverk. Talan er um vøru, sum als ikki er ætlað til nýtslu á nýggjárinum, men einans til at fráboða neyðstøður á sjónum. Talan er um vandamikla vøru, sum í nógv størri mun enn annað fýrverk kann gerast atvold til eldsbruna og álvarsom óhapp.

Sambært § 4, nr. 2 í løgtingslóg um fýrverk hevur landsstýrismaðurin heimild at áseta nærri reglur um gerð, innflutning, at avhenda, at fáa sær og gera nýtslu av fýrverki, sum fyrisett er sum neyðsignal ella sum kann blandast við tílík signal. Líknandi heimildir eru eisini í maritimu lóggávuni.

Ætlanin er at áseta reglur, ið greitt banna nýtslu av neyðrakettum til annað endamál enn tað, sum hendan vøra er ætlað til. Til tess at tryggja, at neyðrakettirnar ikki verða nýttar til annað endamál, kann t.d. verða ásett:

- greiðari reglur um innflutning og sølu,
- reglur um eina pantiskipan, har keyparin, umframt keypspeningin, rindar seljaranum eitt pantigjald, sum verður endurgoldið, tá keypari letur óbrúktar neyðrakattir inn aftur, ella kann skjalprógva, at vøran er nýtt til rætta endamálið, og
- ein hóskandi sekt fyri at nýta neyðrakettir til annað endamál, enn vøran er ætlað til.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 18. januar 2021

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður